# Mín marknaðardagur

**Nú skal ovasta loft ruddast, skápini tømast og skuffurnar reinsast. Marknaðardagurin lýsti við, at í fjør vóru øll borðini tømd, og hetta lokkar meg at bíleggja eitt borð**

Inna Tørnroos

**Leygardagin:**
Ljósastakar, skógvar, og gomul klæði koma oman frá ovasta loftinum.
Ov lítil barnaklæði verða pakkað niður og sminkur, ið eg havi fingið og ongantíð brúkt enda eisini í posunum.

**Sunnudagin:**
**12.30** Marknaðardagurin byrjar um ein hálvan tíma. Borðið kostar 250 krónur, og eg havi fingið tað innasta borðið í Perluni. Ikki gott, hvør tímur at koma inn í hetta tronga hornið, hugsi eg fyri meg sjálva.

**13.00** Mínar kurvar eru upp á pláss. Eg selji mest klæði 20, 30 og 50 krónur kosta tey

**13.10** Ongin keypt nakað enn. Tolið er ikki tað stóra. Men nógv fólk eru, so tað man fara og laga seg.

**13.25** Fyrsti luturin er seldur. Eitt gysiliga ljótt hálsturriklæð, sum maðurin brúkti einaferð í 90-unum. 20 krónur fór tað fyri.

**13.35** Mín London-ponsjo fer fyri 30 kr.

**13.45** Garnposin við gomlum restum fer fyri 30 kr.

**14.00** Eg fari ein lítlan rundtúr. Borðgrannin lovar at selja fyri meg, um nakar er áhugaður. Eg eri burtur í 10 minuttir, og tá eg komi aftur, hevur hon selt fyri 100 krónur. Hvat hevur hon, sum eg ikki havi?

**15.00** Selji okkurt smátt. Allar konur taka í lítlu gummiskógvarnar eg selji, men ongin keypur. Eg lækki prísin 25 krónur til 50.

**15.30** Eg testi grannan aftur og taki eina pissipausu. Má vita um hon eydnast líka væl hesuferð.

**15.40** Nei, tað gjørdi hon ikki. Onki selt tí løtuna eg var burtur.

**16.00** Eg lækki prísin. Alt í stóru kurvunum fer fyri 20 krónur, og tað í teimum lítlu fyri 10 krónur. Nú tími eg ikki meira.

**16.20** Tað virkaði. Lægri prísurin fær fólk at keypa. Mítt gamla slættijarn og sminkurnar fara.

**16.40** Minimala bikiniið, ið eg ongantíð havi passað, fær nýggjan eigara. Jippi!

**17.00** Sama kona kemur aftur og keypir restina av mínum sminkum. Fínt!

**17.20** Fólk pakka saman og vit fáa meira pláss. Eyka, eyka, eyka prísur. Eg keypti tvær taskir og eina blus frá borðgrannanum.

**17.40** Eg pakki saman. Nakað tómt borð síggi eg ongastaðni. Men fólk sýnast hóast alt nøgd við søluna.

*inna@sosialurin.fo*

## Úrslit:

- Eg seldi fyri 450 krónur
- Allar flestu lutirnir fóru fyri 10-30 krónur.
- Borði kostaði 250 krónur
- 200 krónur og eitt ruddiligari heim er úrslitið

*»Sjálvandi eru tað ikki nógvir pengar fyri so nógv arbeiði. Men stóri vinningurin er hóast alt at hava fingið í lag at rudda gomul ting út og fingið eitt rudduligari heim.«*



**SELJARIN**

*Malan Jákupsdóttir seldi bæði tað, sum skuldi seljast, og tað, ið ikki skuldi ...*

# Ommutingini fáa nýtt lív

**MARKNAÐARDAGUR Mitt inni í Perluni standa trý rokað borð. Tað er Malan Jákupsdóttir og familju hennara, ið hava ruddað út hjá ommuni Nellie Sørenesen**

Inna Tørnroos

- Omma eigur alt ov nógv ting, tí vildu vit hjálpa henni, sigur Malan.

Fyri peningin ætlar øll familjan sær út at bowla og eta - og omman skal sjálvandi við.

Taskur, belti, skógvar, steintøj, eitt gamalt stereoanlegg, jakkar, kjólar og mangt, mangt annað.

Tað er tað, sum familjan hjá Nellie Sørensen hevur savnað saman, og nú selur á Marknaðardegnum í Perluni og Reinsarínum.

Tær fimm, Sunnuvá Jacobsen, Rannvá Sørensen, Fríða Sivertsen, Katrin Nolsøe og Malan Jákupsdóttir standa allar við borðið og selja.

Nógv av teimum vitjandi eru áhugaði í gomlum tingum, og sølan gongur strúkandi.

- Hetta er ekta vintage, sigur Malan og vísur eina gamla silkiblus fyri tveimum ungum gentum.

Malan arbeiður dagliga við børnum, men hevur bakgrund sum seljari, og er tað tí ikki nakað fremmant fyri hana at selja á einum marknaði.

Brádliga kemur mamma Maluna, Sunnuva og spyr eftir síni troyggju.

- Tann troyggjan??? Hana havi eg selt fyri 50 krónur, sigur Malan flennandi.

Sunnuva sær eitt sindur bilsin út, men sker síðani út í skellilátur.

Hon fer og ballar restina av sínum tingum væl inn, so at dóttirin ikki selur restina av garderobuni.



**SØLUKONUR**

*Sunnuva Jacobsen, Malan Jákupsdóttir, Rannvá Sørensen, Fríða Sivertsen og Katrin Nolsøe høvdu ruddað út hjá mammuni og ommuni Nellie Sørensen.*

## Gamla dukkan

Malan og restin av familjuni hava eisini ruddað út heima hjá sær sjálvum. Malan selur gomlu dukkuna, við særdum eygað, fyri 200 krónur.

Fleiri gentur vísa áhugað í dukkuni, men Malan angrar seg hvørju ferð, og til endans verður dukkan goymd.

- Eg klári simpulten ikki at selja hana, sigur Malan.

Betri gongur við merkisskógvunum, ið omman eigur í kassavís. Tey, ið hava stødd 37-38 gera kuppi og fáa flottar, næstan óbrúktar skógvar fyri 50 krónur.

Tá dagurin líður móti endanum, er nógv selt, men tær fimm leggja longu ætlanir um at verða við á einum nýggjum marknaði um ein mánað. Annars enda øll tey vøkru tingini í skrellinum, og tað eru tær einigar í, at tað er eitt sindur ov synd.

**» Brádliga kemur mamma Maluna, Sunnuva og spyr eftir síni troyggju. - Tann troyggjan??? Hana havi eg selt fyri 50 krónur, sigur Malan flennandi**